UV

# UMHVØRVISVIKAN
## 3.-10. MAI 2025

# SLÓÐA FYRI

## SAMAN FÁA VIT NÝGGJAR VANAR

TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Leygardagin 3. mai

## 10.00 - 17.00 KLÆDNAUMBÝTINGARDAGUR Á BÝARBÓKASAVNINUM

Hevur tú klæðir, sum tú ikki brúkar longur?
So kanst tú koma á Býarbókasavnið og leggja tey til onnur at taka sær. Samstundis kanst tú ogna tær okkurt plagg - ókeypis - sum onnur hava latið til klædnaumbýtingardagin.

Klæðini liggja frammi á veghæddini allan dagin.

## 11.00 SETANIN AV UMHVØRVISVIKUNI

Kristianna W. Poulsen, forkvinna í náttúru- og umhvørvisnevnd Tórshavnar býráðs, setir umhvørvisvikuna á Vaglinum.

## 11.00 PLANTIÐ EITT TRÆ

Tórshavnar kommuna letur borgarum ókeypis plantupakkar og grønmetisspírar á parkeringsøkinum við býráðssalin.

*Á bygd verður útlutan av plantupakkum og grønmetisspírum leygardagin 10. mai.*

**Havið posa við til planturnar.**

## 11.00 PLANTU- OG MATMARKNAÐUR

Plantu- og matmarknaður í Gongugøtuni í Havn við plantum, sum eru aldar í Føroyum og staðbundnum mati.

Plantualarar frá Gróðurstøðini og matframleiðarar úr øllum Føroyum luttaka, og møguleiki verður at keypa leskiligar hágóðskuvørur beinleiðis frá veitaranum.

## 11.00 - 14.00 SÚKKLUVERKSTAÐUR Á VAGLINUM

Fólk frá Súkkluverkstaðnum hjá Gunnari vera á Vaglinum og hjálpa tær við at fáa súkkluna til reiðar til summarið. Verkstaðið er ókeypis, men rindast má fyri møguligt tilfar.

## 15.00 - 17.00 GONGUTÚRUR Í VELBASTAÐ VIÐ FERÐALEIÐARA ÚR GONGUFELAGNUM

Ein lættur túrur fyri alla familjuna við ferðaleiðara úr Gongufelagnum.

Vit ganga til Steinin á fjalli og hoyra søgnina um steinin.
Um viðrar, ganga vit eisini Niðaná. *Túrurin tekur á leið 1,5 tíma.*

Bussleið nr. 7 koyrir úr Steinatúni klokkan 14.54.
*Til ber at koyra við bussi heim aftur - viðmerk tað, tá tú meldar teg til.*

**Túrurin er ókeypis.**

**Tilmelding: visitorshavn.fo**

# Sunnudagin 4. mai

## 10.00 - 13.00 GONGUTÚRUR SUÐUR Í DALAR Í NÓLSOY

Ein lættur túrur suður í Dalar í Nólsoy fyri alla familjuna við staðkendum ferðaleiðara. Túrurin byrjar kl. 10.00 og tekur á leið 1,5 – 2 tímar. Drekkamunnur verða at fáa aftaná túrin.

Ternan siglur av Bursatanga kl. 9.30 og úr Nólsoy kl. 13.35

**Túrurin er ókeypis.**
*GG. Kostnaðurin fyri ferjuna er ikki íroknaður.*

**Tilmelding: visittorshavn.fo**

## 12.00 - 17.00 FAMILJUDAGUR Í NORÐURLANDAHÚSINUM

Umhvørvisvikan og Norðurlandahúsið bjóða familjum til ein spennandi dag við alskyns virksemi fyri børn og vaksin.

Á skránni verða spíriverkstovur til børn, fyrilestrar fyri vaksin, rundvísing í nýggjum vakstrartunli, sum eisini er opin at vitja, barnabio, bøtiverkstova, plantuveiðuferð og ymiskt annað ítriv, sum familjur kunnu gera saman.

**Tiltøkini eru ókeypis. Opið er frá kl. 12 til 17**

### 13.00 OG 15.00 SPÍRIVERKSTOVUR FYRI BØRN, 7-11 ÁR. BERT FYRI BØRN

**Tilmelding á nlh.fo**

### 13.00 OG 15.00 FRÁSØGN OG RUNDSÝNING Í VAKSTRARSTUNLINUM

Hoyr um spennandi vakstrartunlaverkætlanina uttanfyri Norðurlandahúsið, sum kann gerast slóðbrótandi innan plantugróður í Føroyum.

### 14.00 - 16.00 SASHIKO-BRODERING - EIN VERKSTOVA VIÐ ERLU MATRAS JENSEN

Bøt og betra klæðir við prýðiligari japanskari brodering.

**Tilmelding á nlh.fo**

### 16.00 GRØNMETI TIL FØROYSKAR GARÐAR — FYRILESTUR VIÐ SIGGU RASMUSSEN OG KARINU TOFTEGAARD

Tær fara at koma við góðum ráðum og tosa út frá bókini "Plantur til matna", sum Sigga Rasmussen hevur skrivað. Teldutøka bókin fæst ókeypis á heimasíðuni hjá Nám.

## 15.00 - 17.00 SÚKKLURUNDFERÐ Í HAVN

El-súkklurundferð kring Havnina við ferðaleiðara frá Rent-a-bike. Vit vitja søguligar og mentanarligar perlur og vøkur náttúrustøð í Tórshavn.

Túrurin byrjar uttanfyri Rent-a-bike á Sverrisgøtu 2 og varar umleið tveir tímar samanlagt. Tú fært útflýggjað el-súkklu og hjálm.

*Túrurin er ókeypis og aldursmarkið er 15 ár.*

**Tilmelding: visittorshavn.fo**

# Mánadagin 5. mai

## 8.30 OG 10.00 UMHVØRVISVEIÐA Á MARGARINFABRIKKINI

Umhvørvisveiða á Margarinfabrikkini fyri
1.-4. flokkar í Tórshavnar kommunu.
Lærarar melda flokkarnar til á **fabrikkin@torshavn.fo**.

## 9.00 OG 11.00 VITJAN Á KOMMUNALU BRENNISTØÐINI

Tiltakið er fyri 5. flokkar í Tórshavnar kommunu.
Lærarar melda flokkarnar til á **dagbjort@torshavn.fo**
ella á **tlf. 280906.**

## 10.00 - 20.00 VEIÐUFERÐ Á BÝARBÓKASAVNINUM - VINN EINA SÚKKLU

Býarbókasavnið bjóðar øllum børnum á veiðuferð eftir
súkklulutum á barnabókasavninum.
Øll, sum luttaka, eru við í lutakasti um eina súkklu.

**Tiltakið er ókeypis.**

## 17.00 - 21.00 SEYMA BERINET ÚR ENDURNÝTSLUTILFARI Í NÝNÝ

Lær at seyma berinet úr endurnýtslutilfari í seymiverkstovuni
NýNý hjá Bláa Krossi í Niels Finsens gøtu 20.

Verkstovan er ókeypis, og aldursmarkið er 16 ár.

**Tilmelding: visittorshavn.fo**

# Týsdagin 6. mai

## 8.30 og 10.00 UMHVØRVISVEIÐA Á MARGARINFABRIKKINI

Umhvørvisveiða á Margarinfabrikkini fyri 1.-4. flokkar í Tórshavnar kommunu. Lærarar melda flokkarnar til á **fabrikkin@torshavn.fo**.

## 9.00 og 11.00 VITJAN Á KOMMUNALU BRENNISTØÐINI

Tiltakið er fyri 5. flokkar í Tórshavnar kommunu.
Lærarar melda flokkarnar til á **dagbjort@torshavn.fo**
ella á **tlf. 280906**.

## 10.00 - 20.00 VEIÐUFERÐ Á BÝARBÓKASAVNINUM - VINN EINA SÚKKLU

Býarbókasavnið bjóðar øllum børnum á veiðuferð eftir súkklulutum á barnabókasavninum.
Øll, sum luttaka, eru við í lutakasti um eina súkklu.

**Tiltakið er ókeypis.**

## 17.00 - 19.00 NÝNÝ - SEYMIVERKSTOVA ÚR ENDURNÝTSLUTILFARI

Kom og seyma tær eitt plagg úr endurnýtslutilfari í NýNý seymiverkstovuni hjá Bláa Krossi í Niels Finsens gøtu 20.

*Upplatingin er treytað av at tilmeldingar eru.*
Melda til í seinasta lagi tveir tímar áðrenn upplating við at senda eini boð á **Facebook** ella **Instagram** vangan hjá NýNý og boða frá, nær tú ætlar tær at vera har.

**Tiltakið er ókeypis.**

## 19.00 BURÐARDYGD Í VERKI – VERULIGAR AVBJÓÐINGAR OG LOYSNIR – FYRILESTUR Í PERLUNI VIÐ GITTEMARIE JOHANSEN

Áhugaverdur og kveikjandi fyrilestur í Perluni við rithøvundanum og umhvørvismiðlaranum, Gittemarie Johansen, eisini kend á Instagram við brúkaranum **@gittemary**.

Fyrilesturin snýr seg um, hvussu vit í eini tíð við veðurlagskreppu, avmarkaðum tilfeingi og óteljandi ósamsvarandi boðum finna skil í øllum hesum.

Hvussu kunnu vit brúka okkara tíð og orku til veruliga broyting uttan at drukna í maktarloysi? Gittemarie skilir ímillum greenwashing og veruligar loysnir. Hon gevur eitt hvast, men veruleikakent innlit í, hvussu bæði borgarar og fyritøkur kunnu gera mun.

**Fyrilesturin er ókeypis og drekkamunnur verður at fáa.**

# Mikudagin 7. mai

## 8.30 OG 10.00 UMHVØRVISVEIÐA Á MARGARINFABRIKKINI

Umhvørvisveiða á Margarinfabrikkini
fyri 1.-4. flokkar í Tórshavnar kommunu.
Lærarar melda flokkarnar til á **fabrikkin@torshavn.fo**.

## 9.00 - 11.00 HVUSSU GERA VIT MUN? — BURÐARDYGD UTTAN BULLSHIT

Tiltak fyri miðnáms- og hádeildsnæmingar í
Tórshavnar kommunu í Norðurlandahúsinum.
Undirvísarar melda flokkar til á **torsinfo@torshavn.fo**.

**Tiltakið er ókeypis.**

## 10.00 - 20.00 VEIÐUFERÐ Á BÝARBÓKASAVNINUM - VINN EINA SÚKKLU

Býarbókasavnið bjóðar øllum børnum á
veiðuferð eftir súkklulutum á barnabókasavninum.
Øll, sum luttaka, eru við í lutakasti um eina súkklu.

**Tiltakið er ókeypis**

## 10.00 RUDDINGARDAGUR FYRI SKÚLAR, STOVNAR OG VIRKIR

Ver við í lutakastinum um tvey gávukort upp á 6.000 kr.
við at senda inn mynd frá ruddingardegnum.
**Freistin at lata myndir inn og vera við í lutakastinum er 14. mai.**

Melda til í **seinasta lagi 6. mai** og send mynd til kappingina
á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu á Ruddingardagar 2025:
**torshavn.fo/temu/umhvoervi/ruddingardagar-2025**

## 17.00 NÝTT TING- OG LEIKASAVN LETUR UPP Á BÝARBÓKASAVNINUM

Kristianna W. Poulsen, forkvinna á náttúru- og
umhvørvisnevnd Tórshavnar býráðs bjóðar vælkomin.

Vónbjørt Vang býarbókavørður og leiðari á Býarbókasavninum
greiðir frá um nýggja Ting- og leikasavnið.

**Góður drekkamunnur verður at fáa.**

## 20.00 FILMSÝNING Í HAVNAR BIO: THE END

Í samstarvi við Filmsfelagið sýna vit nýggja filmin hjá Oscartilnevnda leikstjóranum, Joshua Oppenheimer: Fimmogtjúgu ár eru liðin síðan ein stór umhvørvisvanlukka elvdi til, at ikki ber til at búgva á Jørðini. Húskið, sum filmurin lýsir, er byrgt inni í einum undirjørðiskum bunkara. Her royna foreldrini og sonurin at halda fast í vónini, og koma gjøgnum dagin við gerandisligum ritualum og virksemi. Men so kemur ein genta og vendur øllum á høvdið. Filmurin er ein nemandi og djúpt menniskjansligur sangleikur í eini dystopiskari framtíð, sum lýsir nøkur av seinastu fólkunum, ið til eru.

Kristianna Winther Poulsen, forkvinna í náttúru- og umhvørvisnevndini fer at innleiða sýningina í Havnar Bio.

Les meira um filmin, og ogna tær ókeypis atgongumerki
á heimasíðuni hjá Havnar Bio: **bio.fo/filmsfelagið**

# Hósdagin 8. mai

## 8.30 og 10.00 UMHVØRVISVEIÐA Á MARGARINFABRIKKINI

Umhvørvisveiða á Margarinfabrikkini fyri 1.-4. flokkar
í Tórshavnar kommunu. Lærarar melda flokkarnar til á:
**fabrikkin@torshavn.fo**.

## 10.00 - 20.00 VEIÐUFERÐ Á BÝARBÓKASAVNINUM - VINN EINA SÚKKLU

Býarbókasavnið bjóðar øllum børnum á veiðuferð
eftir súkklulutum á barnabókasavninum.
Øll, sum luttaka, eru við í lutakasti um eina súkklu.

**Tiltakið er ókeypis.**

## 13.30 - 16.30 LÆTTA UM BURÐARDYGGU MANNAGONGDIRNAR – THE SUSTAINABLE SEMINAR Í NORÐURLANDAHÚSINUM

The Sustainable Seminar er eitt seminar um burðardygd, har umboð fyri Green Producers Club (GPC) fara at greiða frá teirra arbeiði við burðardygd í skapandi vinnunum. Tiltakið er fyriskipað í samstarvi við Norðurlandahúsið og gevur týdningarmikið innlit í burðardyggar mannagongdir.

Á skránni er framløga um Green Producers Club, gjøgnumgongd av einstøkum dømum og framløgur um átøk innan fyri kreativa geiran.

Eisini verða verkstovur, har tú kanst royna amboðskassan hjá GPC og læra, hvussu tit kunnu brúka amboðini í tykkara egnu fyritøku ella felagsskapi.

Tiltakið er viðkomandi fyri tey, ið arbeiða við ítrótti, framførslum, filmi og sjónvarpi, við bæði størri og smærri tiltøkum, og fyri øll áhugað.

**Tiltakið er alment og ókeypis.**

## 17.00 - 19.00 NÝNÝ - SEYMIVERKSTOVA ÚR ENDURNÝTSLUTILFARI

Kom og seyma tær eitt plagg úr endurnýtslutilfari í
NýNý seymiverkstovuni hjá Bláa Krossi í Niels Finsens gøtu 20.

*Upplatingin er treytað av at tilmeldingar eru.*
Melda til í seinasta lagi tveir tímar áðrenn upplating við at
senda eini boð á Facebook ella Instagram vangan hjá
NýNý og boða frá, nær tú ætlar tær at vera har.

**Tiltakið er ókeypis.**

## 18.00 - 19.45 GRØNA KVØLDIÐ Í KALDBAKSHØLLINI

Kom til eitt áhugavert og læruríkt kvøld í Kaldbakshøllini í Kaldbak, har umhvørvið er á breddanum við spennandi fyrilestrum, virðislønahandanum og livandi tónleiki við Guðrið Hansdóttir og Heiðriki á Heygum. Eisini verður umhvørvisstuðulin latin.

Kristianna W. Poulsen fer at greiða frá um umhvørvispolitikkin í Tórshavnar kommunu, hvør støðan er, og hvørja leið ...

kommunan velur at fara.

Gittemarie Johansen, rithøvundur og umhvørvismiðlari, fer at hava eina hvassa og kveikjandi framløgu um Greenwashing. Um tær snildir, sum fyritøkur nýta fyri at fáa okkum at halda, at tær eru meira burðardyggar, enn tær í veruleikanum eru. Hon avdúkar, hvussu brúkarar verða villleiddir – og tað týdningarmesta: hvussu tú kanst læra at gjøgnumskoða hetta!

Brellbitar verða at fáa, áðrenn vit byrja og góðbitar og kaffi í steðginum

Býarbussurin, leið 5, koyrir av Hálsi í Havn kl. 17.18
og úr Kaldbak kl. 19.55.

**Tiltakið er ókeypis.**

# Fríggjadagin 9. Mai.

## 8.30 OG 10.00 UMHVØRVISVEIÐA Á MARGARINFABRIKKINI

Umhvørvisveiða á Margarinfabrikkini fyri
1.-4. flokkar í Tórshavnar kommunu.

Lærarar melda flokkarnar til á **fabrikkin@torshavn.fo**.

## 10.00 - 20.00 VEIÐUFERÐ Á BÝARBÓKASAVNINUM - VINN EINA SÚKKLU

Býarbókasavnið bjóðar øllum børnum á veiðuferð
eftir súkklulutum á barnabókasavninum.
Øll, sum luttaka, eru við í lutakasti um eina súkklu.

**Tiltakið er ókeypis.**

## 17.00 - 19.00 SÚKKLURUNDFERÐ Í HAVN

El-súkklurundferð kring Havnina við ferðaleiðara frá Rent-a-bike.
Vit vitja søguligar og mentanarligar perlur og vøkur náttúrustøð
í Tórshavn.

Túrurin byrjar uttanfyri Rent-a-bike á Sverrisgøtu 2 og varar
á leið tveir tímar samanlagt. Tú fært útflýggjað el-súkklu og hjálm.

Túrurin er ókeypis og aldursmarkið er 15 ár.

**Tilmelding: visittorshavn.fo**

# Leygardagin 10. mai

## 9.00 ALMENNI RUDDINGARDAGURIN - FYRI ALLAR BORGARAR, EIGARA-, ÍTRÓTTA- OG ÁHUGAFELØG

Ver við í lutakastinum um tvey gávukort upp á 6.000 kr.
við at senda inn mynd frá ruddingardegnum.
*Freistin at lata myndir inn og vera við í lutakastinum er 14. mai.*

Melda til og send mynd á heimasíðuni hjá
Tórshavnar kommunu:
**torshavn.fo/temu/umhvoervi/ruddingardagar-2025**

**Seinasta freist at tekna seg til ruddingardagin er týsdagin 6. mai 2025.**

## 9.00 RUDDINGARDAGUR ÚTI Á BYGD

Staðbundnu nevndirnar skipa fyri ruddingardegi.
Bingjur og posar verða koyrd út til bygdirnar.

Ver við í lutakastinum um tvey gávukort upp á 6.000 kr.
við at senda inn mynd frá ruddingardegnum.
*Freistin at lata myndir inn og vera við í lutakastinum er 14. mai.*

Melda til og send mynd á heimasíðuni hjá Tórshavnar kommunu;
**torshavn.fo/temu/umhvoervi/ruddingardagar-2025**

**Seinasta freist at tekna seg til ruddingardagin er týsdagin 6. mai 2025.**

## 9.00 PLANTIÐ EITT TRÆ ÚTI Á BYGD

Tórshavnar kommuna letur borgarum ókeypis plantupakkar og grønmetisspírar. Hendan dagin verður latið til borgarar í Kollafirði, Kaldbak, Nólsoy, Kirkjubø, Hesti, á Hvítanesi og Velbastað.

**Havið posa við til planturnar.**

## 10.00 - 20.00 VEIÐUFERÐ Á BÝARBÓKASAVNINUM - VINN EINA SÚKKLU

Býarbókasavnið bjóðar øllum børnum á veiðuferð eftir súkklulutum á barnabókasavninum.
Øll, sum luttaka, eru við í lutakasti um eina súkklu.

**Tiltakið er ókeypis.**

# UMHVØRVISVIKAN
# 3 -10 MAI 2025

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA